# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg hevði ongantíð ætlað, at politikkur skuldi vera mítt lív, og nú er tíðin komin til at gevast*

*(Rikke Hvilshøj)*

# Fleiri hundrað fólk hvurvu í flóðalduni

**Ein fimm metrar høg flóðalda skolaði í nátt inn yvir tríggjar býir í Bangladesh, men eingin veit, hvussu mong eru deyð**



*Túsundtals fólk hava mist hús og heim í ódnarveðrinum í Bangladesh*

Tann fimm metrar høga flóðaldan legði býirnar Patuakhali, Barguna og Jhalakathi undir í sjógvi. Embætismenn siga, at alt samskiftið við býirnar fór. Lokalir fjølmiðlar siga seg tó hava frætt, at í minsta lagi fleiri hundrað fólk hvurvu í flóðalduni.

Myndugleikarnir í høvuðsstaðnum Dhaka viðgingu fyrrapartin, at teir hava ikki yvirlit yvir, hvat veruliga er hent í teimum trimum býunum, har umleið 700.000 fólk búgva. Hinvegin vita teir við vissu, at í minsta lagi 242 fólk eru deyð aðrastaðni í landinum, eftir at tropiska ódnin Sidr kom inn at landi í gjárkvøldið, men myndugleikarnir siga, at tað er eingin ivi um, at talið á deyðum er størri enn so.

Veðurtænastan heitti í gjár á fiskifør um at seta kós ímóti landi, men lokalar útvarpsstøðir at siga, at fleiri hundrað fiskifør náddu ikki at koma til lands undan ódnini.

Ódnarveðrið hevur serliga gjørt um seg í landslutunum Mongla, Barisal og Khulna í útsynningspartinum av landinum. Vindferðin í hvirlunum kom upp í 67 metrar um sekundið, og fleiri túsund hús eru oyðiløgd.

Myndugleikarnir høvdu ávarað fólkið í láglendinum um, at ein tropisk ódn var á veg ímóti landi, og sjálvboðin hjá Reyða Hálvmána hjálptu í gjár fleiri túsund fólkum burtur frá strondini.

Men tað búgva umleið 10 milliónir fólk í láglendinum, og sambært fjølmiðlunum eru bara trygdarrúm til umleið eina hálva millión fólk har.

# Russiskir fimmburðar í Bretlandi

**Ein 29 ára gomul russisk kvinna hevur fingið fimmburðar á einum bretskum sjúkrahúsi**

Heima í Russlandi vildu læknarnir hava kvinuna at taka í hvussu er nøkur av fostrunum. Men kvinnan segði nei, og við hjálp frá góðum vinfólki og múgvandi russum eydnaðist tað henni at sleppa á eitt sjúkrahús í Bretlandi.

Í gjár átti fekk kvinnan fimm døtur, sum vórðu tiknar við keisaraskurði. Genturnar vigaðu millum 811 og 963 gram, tá teir komu í verðina, men læknarnir á John Radcliffe-sjúkrahúsinum í Oxford siga, at genturnar hava tað gott.

-Alt gongur, sum tað skal. Genturnar eru í menning, og mamman er um at koma fyri seg, segði talskvinnan hjá sjúkrahúsinum við The Times.

Tað er ikki so óvanligt, at kvinnur fáa fimmburðar, men sjáldan liva allir leingi, skrivar Reuters. Harafturat kann tað vera vandamikið fyri eina kvinnu at ganga við fimmburðum, men tann russiska kvinnan vildi ikki hava fosturtøku.



*Foreldrini við einari av teimum fimm gentunum*

*(Mynd: AFP)*

## STUTT SAGT

### Prestur sendast til USA

Í Bretlandi hevur ein dómstólur gjørt av, at muslimski presturin Abu Hamsa al-Masri kann verða útvístur til USA, har hann kann koma fyri rættin fyri at hava stuðlað al-Qaeda og fyri at hava verið uppi í einari gíslatøku. Abu Hamza al-Masri, sum er 48 ára famal og einoygdur, hevur sitið í fongsli í Bretlandi síðani í februar í 2006, tá hann bleiv dømdur seks ára fongsul fyri at hava eggja til dráp og hatur. Amerikanska ákæruvaldið vil hava prestin fyri rættin har, tí hann var við til at burturflyta nakrar vesturlendskar ferðamenn í Yemen í 1999. Hann er eisini skuldsettur fyri at hava skipað nakrar venjingarlegur fyri yvirgangsmenn í amerikanska statinum Oregon.

### Chevez hóttir við hevnd

Forsetin í Venesuela, Hugo Chavez, vil hava eina umbering frá Juan Carlos kongi í Spania, sum bað forsetan halda kjaft, tá teir báðir vóru á einum latínamerikonskum leiðarafundi seinasta vikuskiftið. Á einum tíðindafundi í gjár segði Hugo Chavez, at fær hann ikki eina umbering frá spanska konginum, kann tað fáa avleiðingar fyri spanskar fyritøkur, sum virka í Venesuela. Í Spania eru fólk á einum máli um, at kongur skal ikki biðja Chavez um umbering, og eygleiðarar, sum vóru á ríkisleiðarafundinum seinasta vikuskiftið, siga, at spanski kongurin segði ikki annað enn tað, sum hinir leiðararnir kundu hugsað sær at sagt.

### Eiturkopparnir koma

Tey seinastu 150 árini hevur Evropa fingið 87 sløg av eiturkoppum, sum ikki vóru her frammanundan. Tað sigur sveisiski lívfrøðingurin Wolfgang Nentwig við sveisisku tíðindastovuna ATS. Professarin í Bern sigur, at tey flestu eiturkoppasløgini eru komin úr Norðurafrika, og hann ivast ikki í, at uppaftur fleiri fara at koma, so hvørt sum tað gerst heitari í Evropa. Wolfgang Nentwig sigur, at eitrandi eiturkoppar kunnu eisini koma til Evropa, men at enn eru slíkir ikki funnir úti í náttúruni her.